iskjasonin, og tessvegna er Hann – Jesus Kristus – okkara loysigjald. Eingin synd verður tilroknað okkum, sum trúgva á Jesus. Paulus sigur í Róm. 8, at so er nú eingin fordøming fyri tey, sum í Kristi Jesusi eru. Og tað merkir, at tá vit trúgva eru vit í Kristusi, og gamla menniskja okkara, sum var undir dómi, er deytt við Kristi deyða á Golgata. Og hetta er eisini proklamatiónin í dópinum, at vit jarða gamla menniskja og nýggja menniskja reisist upp úr vatninum. Í sannheit eitt stórt undur, sum er vert at fevna og taka til sín.

Í samrøðu Jesusar við Nikodemus sigur Hann: Verður ein ikki føddur av nýggjum, kann hann ikki síggja ríki Guds. Og í her liggur týdningurin av, at ikki bert doyggja við Jesusi, men at verða reistur upp aftur við Jesusi. Tað er ein fantastisk broyting í lívinum, tá syndabyrðan er burtur, og vit verða frelst, bjargaði frá dómi og deyða. Men har eftir mugu vit byrja at liva lívið, sum uppreisnin hevur í sær. Og tað er tað, sum Paulus peikar á í Kolossebrævinum tá hann sigur: Eru tit tá uppreist við Kristusi, so søkið tað, sum omanfyri er; og víðari sigur hann: Tráið eftir tí, sum omanfyri er. At vera uppreist við Kristusi snýr seg júst um hetta: At tráa eftir tilstandinum við trónu Guds, og draga hann niður á jørðina, inn í okkara viðurskifti.

At liva í uppreisn Kristusar merkir heilt einfalt at liva við Heilaga Andanum. Andin er talsmaðurin og við Honum hava vit allan Guddómin í okkum. Andin dregur av tí Himmalska og gevur okkum opinberingar, kraft, gleði, vón o.s.fr., so tað merkist, at vit eru fødd omanífrá – fødd av nýggjum. Um vit ikki samskifta við Heilaga Andan, so verður sinn okkara óbroytt í mun til tað gamla menniskja, og so verða vit líka negativ, vónleys og máttleys sum tey, sum ikki eiga Jesus. Okkara kall er at liva øðrvísi, so heimurin kann síggja tað lívið, sum uppreisnar kraftin gevur til kennar. Eg havi tí hesa støðugu áheitanina til øll trúgvandi: Biði í Heilaga Andanum altíð – biði í tungum. Tað ger okkara hugsan Gudsbevísta og Heilagi Andin gevur okkum tankar, sum eru viðkomandi í tí støðu, vit munna vera í. Eru vit tá uppreist við Kristusi, so latið okkum søkja tað, sum omanfyri er hvønn einasta dag.

Við ynski um einar gleðiligar páskir.

tj

STUÐLA ARBEIÐINUM HJÁ FILADELFIA

Um tú ynskir at stuðla arbeiðinum hjá Filadelfia, kanst tú flyta pening á konto í Betri nr. 9181 495 353 5

Tú ert vælkomin at viðmerkja á flytingina um tað er tíggjund, gáva ella annað. Takk fyri!

Samkomuleiðslubólkurin

Filadelfia

„Himmal á jørð“

Eru tit tá uppreist við Kristusi… Kol. 3,1:

So eru páskir aftur fyri framman og tíðin bara rennur avstað – 2025 hvør skuldi trúð tí. Sum ein verður eldri hugsar ein aftur í tíðina, og sum ungur minnist eg at vit „pinsar“ ofta vitjaðu Betania í Skopun, og høvdu páskastevnu saman. Seinni gjørdist páskastevnan hjá Kelduni og Oasuni siðvenja, og vit fluttu okkara áherslu á hvítusunnu. Ein vanligur siður hjá okkum er, at vit á páskum vitja Hvítusunnukirkjuna í Keflavík, og í ár eru tað 8, sum fara avstað.

Páskirnar eru sermerktar av hendingini, sum Jesus fullførdi menniskjans vegna fyri 2.000 árum síðani (ella har á leið). Júst hvussu nógv ár eru liðin er ikki so avgerandi, men tað avgerandi er, at Jesus doyði og varð reistur uppaftur frá deyðanum.

At Jesus doyði í títt og mítt stað merkir, at vit við trúnni á Jesus og á Hansara fullgjørda verk, eru deyð frá falna menniskjanum. Allur dómur Guds og øll vreiði Guds varð helt yvir menn-

APRÍL 2025

Mikudagur	2.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	5.		**Reingerð:** Ingun
Sunnudagur	6.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Eyðbjørg, Áshild og Kári Ábyrgd/leiðari: Vinjard Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur I Uppvørpa: Ragnar Ljóðbland: Sjúrður Tulkur: Ragnar Talari: Laura Bohl Kaffivertar: Eyðbjørg, Áshild og Kári
Mánadagur	7.	Kl. 19.00	**Felagsbøn í Vón**
Mikudagur	9.	Kl. 10.00 Kl. 18.30	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna **Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Leygardagur	12.	Kl. 10.00	**Hugnaløta fyri øll við morgunmati** **Reingerð:** Anna
Sunnudagur	13.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting og inns. til húsið** **Barnamøti** Møtivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner Ábyrgd/leiðari: Ása L. Lovsongsleiðari: Nomi, bólkur II Uppvørpa: Jóel Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Tummas J. Kaffivertar: Hellen, Sjúrður, No-omi og Marner
Mánadagur	14.	Kl. 20.00	**Bønarskúlin** Ábyrgd/leiðari: Anna
Mikudagur	16.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna
Leygardagur	19.		**Reingerð:** Conny
Páskadagur	20.		**Einki møti**
2. páskadagur	21.		**Einki møti**
Týsdagur	22.	Kl. 19.30	**Økumenisk gudstænasta í Frelsunarherinum**
Mikudagur	23.	Kl. 10.00 Kl. 18.30	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna **Barna- og ungdómsarbeiði** Ábyrgd: Nomi
Hósdagur	24.	Kl. 20.00	**Hugnaløta fyri ungar gentur og kvinnur**
Leygardagur	26.		**Reingerð:** Katy
Sunnudagur	27.	Kl. 11.00 Kl. 11.30	**Morgunmøti v. breyðbróting** **Barnamøti** Møtivertar: Fríðbjørn og Annfinn Ábyrgd/Leiðari: Mariann Lovsongsleiðari: Tummas J., bólkur II Uppvørpa: Ása Elisabeth Ljóðbland: Tummas D. Tulkur: Høgni Talari: Alex Kaffivertar: Fríðbjørn og Annfinn
Mánadagur	28.	Kl. 20.00	**Lovprísan og forbøn** Ábyrgd/leiðari: Hildibrandur
Mikudagur	30.	Kl. 10.00	**Bøn** Ábyrgd/leiðari: Anna

Fyrivarni verður tikið fyri, at broytingar kunnu koma í skránna.

Barnamøti er hvønn sunnudag kl.11.30 til 12.45

Øll børn eru vælkomin.
Foreldur skulu vera við teimum smáu, sum ikki kunnu vera einsamøll.
Vit syngja, hoyra bíbliusøgu, biðja, práta, eta og ítriv og spæl.